# Dagstovnurin í Hoyvík rundar tey 20

**Leygardagin 23. august fyllir Dagstovnurin í Hoyvík 20 ár. Hetta verður hátíðarhildið við ymiskum tiltøkum á sjálvum stovninum**

FØÐINGARDAGUR
*Ingrid Bjarnastein*

**Hoyvík:** Sólin bakaði niður í Hoyvík, tá Sosialurin kom framvið ein morgun uppi í Dagstovninum. Bæði børn og starvsfólk hugnaðu sær uttanfyri. Nøkur børn spældu í sandinum, onkur súkklaði, onkur triðji var í reiggjunum og so var tað onkur sum gekk og rann við einum flugusmekkara og royndi at kroysta eina veps ella báðar tvær.

Børnini byrja nú so smátt at koma aftur úr summarfrítíðini, og stovnurin byrjar so smátt at fyllast, og um smáar tvær vikur, verður ein stórur dagur. Tá fyllir dagstovnurin í Hoyvík nevniliga 20 ár, og tá verður dagurin hátíðarhildin við ymiskum tiltøkum á stovninum og veitslu fyri starvsfólkinum seinni.

– Seinnapartin fara vit at hava opið hús, har vit fara at hava eina myndaframsýning. Vit vóna at síggja so nógv gomul børn, sum møguligt, sigur Ingun Pedersen, leiðari á Dagstovninum í Hoyvík.



Dagstovnurin í Hoyvík fyllir tann 23. august 20 ár

Mynd: Álvur

### Trívast væl

Ein café verður eisini sett upp í tí stóru stovuni, og børn, sum hava gingið á Dagstovninum fara at undirhalda við tónleiki.

Ingun Pedersen hevur arbeitt á Dagstovninum í Hoyvík øll 20 árini, og seinastu árini hevur hon eisini verið leiðari.

– Tað eru nógv tey somu fólkini, sum hava verið her øll árini, og vit trívast eisini ótrúliga væl. Stovnurin er í sær sjálvum ikki broyttur nógv øll árini, og barnatalið er tað sama, sum tað var tá vit byrjaðu, greiðir Ingun frá.

Dagstovnurin í Hoyvík hevur pláss fyri 72 børnum. 30 vøggustovubørnum og 42 barnagarðsbørnum.

## Stolin bilur

STULDUR
*Ingrid Bjarnastein*

Um vikuskiftið varð ein bilur stolin av Bilasøluni hjá Wenzil. Løgreglan steðgaði bilinum aftur í Kaldbaksbotni, og tað vísti seg, at ein 17 ára gamal drongur hevði tikið bilin. Hann verður ákærdur fyri stuldur og fyri at hava koyrt uttan at hava nakað koyrikort.

Annars letur løgreglan væl at vikuskiftinum. Ovastevna hevur verið um vikuskiftið, og har hevur verið rættiliga friðarligt, tá hugsað verður um tey mongu fólkini, sum hava vitjað í Nólsoy. Ein árabátur varð tó tikin av Skálatrøð, men hann var eisini funnin aftur har niðri, bara á einum øðrum stað. Somuleiðis hevði onkur roynt at sloppið sær avstað við einum glastrevjabáti. Hurðin var brotin og eisini ein rútur. Startlásið varð eisini brotið, men tað hevur ikki eydnast gerningsmanninum at sleppa avstað við bátinum.

Ein hevði fingið nevan frammaná úti í Nólsoy, og har hevur løgreglan fingið upplýst, hvør hin parturin var.

## Kvinnur til hendurs

ÓFRIÐUR
*Ingrid Bjarnastein*

Náttina til sunnudagin fekk løgreglan í Havn boð um, at tvær kvinnur vóru farnar til hendurs uttanfyri ein náttklubba í Havnini. Tær báðar kunnu vænta at verða skuldsettar fyri brot á politiviðtøkuna.

Politiið var annars úti eini 15 ferðir fyri at vakja fullar avdotnar menn, og teir vóru í flestu førunum vaktir og sendir til hús, men tveir av teimum endaðu í brummuni at sova rúsin av sær.

Tríggjar ferðir var politiið til húsaófrið, og tað einu ferðina tóku teir ein mann við aftur á støðina, sum hevði brotið nakað av innbúgvi.

## Herverk á nummarplátur

HERVERK
*Ingrid Bjarnastein*

Um vikuskiftið hevur umfatandi herverk verið gjørt á nummarplátur í eysturbýnum í Havn.

Á tveimum bilum vóru nummarpláturnar tiknar av, boygdar og oyðilagdar, og á fleiri øðrum bilum hevði onkur gjørt seg inn á tær.

Løgreglan sigur, at tað er sannlíkt, at tað eru somu persónar, sum hava gjørt seg inn á bilarnar, og teir vilja fegnir frætta frá fólki, ið møguliga hevur onkrar upplýsingar.

# Ráðstevna fyri alment sett starvsfólk



RÁÐSTEVNA
*Stefan í Skorini*

Síðst í hesum mánaðinum verður norðurlendsk ráðstevna í Føroyum fyri fakfeløg hjá alment og kommunalt settum starvsfólkum. Tað er Nordisk Tjenestemands Råd, NTR, ið skipar fyri ráðstevnuni.

Starvsmannafelagið fekk limaskap í hesum felagsskapinum í fjør, og nú verður ráðstevnan hildin í Føroyum. Tað er bara Grønland av Norðurlondunum, sum ikki er limur í hesum felagsskapinum.

Ráðstevnan verður 28. til 31. august á Hotel Hafnia. Talan er ikki um eina almenna ráðstevnu, og millum sjeyti og sjeytifimm fólk luttaka á stevnuni.

Tað er annars tað danska fakfelagið, ið er vertur, men tað hevur valt at halda ráðstevnuna í Føroyum.

Á hesi stevnuni verður støðan hjá alment og kommunalt settum starvsfólki viðgjørd, og spurt verður hvørjar avbjóðingar standa fyri framman.



Nýggjur loftferðslupolitikkur verður orðaður:

# Fríari kapping í væntu

**Arbeitt verður í løtuni við at orða ein nýggjan loftferðslupolitikk. Hugt verður gjølla eftir ásetingunum hjá ES í loftferðslupakkanum, sum merkja munandi fríari kapping. Sjálvur er Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í loftferðslumálum, sannførdur um, at fleiri flogfeløg á Føroya rutunum vilja vera øllum til gagns**

LOFTFERÐSLA
*Heri á Rógvi*

Í Vinnumálaráðnum í Tinganesi arbeiða tey í hesum døgum við at orða ein nýggjan loftferðslupolitikk. Hetta er ætlað sum ein endurskoðan av verandi politikki á loftferðsluøkinum.

Men greitt er longu nú, at hesin nýggi loftferðslupolitikkurin mest sannlíkt fer at merkja munandi broytingar á loftvegis ferðasambandinum til og úr Føroyum.

### ES

Eitt, sum hyggjast skal væl eftir í sambandi við nýggja loftferðslupolitikkin, er støðan hjá ES. Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í loftferðslumálum, sigur, at ES hevur ein loftferðslupakka, ið vit eiga at hyggja væl eftir. Hesin pakkin ásetir nakrar týðandi dereguleringar (endurjavningar) á loftferðsluøkinum.

– Ein tílíkur politikkur vil kanska ikki merkja púra fría kapping - men tað vil munandi fríari kapping, enn tað er í dag, sigur Bjarni Djurholm.

Ásetingarnar á loftferðsluøkinum í Føroyum geva bert Maersk-Air og Atlantic Airways loyva at røkja flest allar ruturnar til og úr Føroyum. Og í sambandi við nýggja loftferðslupolitikkin heldur Bjarni Djurholm eisini, at tað er pláss fyri fleiri flogfeløgum.

Tað vildi bert viðført fyrimunir fyri øll, um ein operatørur afturat kom á føroyska marknaðin, sigur Bjarni Djurholm.



*Pláss er fyri einum operatørum aftur teimum verandi á flogvøllinum í Vágum, heldur Bjarni Djurholm*

Landsstýrismaðurin sigur tó, at tað er nógv at hugsa um, tá ein tílíkur politikkur skal orðast. Ætlanin er eisini, at umboð úr vinnuni vera við í einum arbeiðsbólki, sum skal arbeiða við nýggja politikkinum á loftferðsluøkinum.

– Atlantic Airways er orsøkin til, at vit hava fingið kapping á økinum, og tað er ikki meiningin, at felagið bara skal hvørva. Men sjálvandi skulu vit fyrst og fremst arbeiða brúkara- og samfelagssjónarmiðunum sum politikarar, sigur Bjarni Djurholm, sum kundi hugsað sær, at verandi flogfeløg í Føroyum fingu tíð at umstilla seg til møguligar broytingar, tá hesar einaferð skulu setast í verk, soleiðis at øll eru á líka fóti at skapa sær eina framtíð í javnbjóðis kapping.

### Einskilja

Samstundis sum Bjarni Djurholm arbeiðir við nýggjum loftferðslupolitikki, so verður eisini arbeitt við at einskilja(privatisera) Atlantsflog.

Hesar báðar prosessirnar koyra paralelt, men eg havi boðað løgmanni frá, at tann besta loysnin er, um vit bíða við einari endaligari einskiljing til hesin nýggi politikkurin er orðaður og semja er fingin um hann. Hetta er tað besta fyri allar partar – eisini møguligar keyparar, sum sostatt vit, hvat teir fara inn í, sigur Bjarni Djurholm.

Landsstýrismaðurin kallar tað yvirtulking, tá blaðmaðurin roynir at fáa prátið at snúgva seg um, at Atlantic Airways hevur eina serstøðu, og landsstýrismaðurin roynir at verja sínar ognir.

Tað er nógv, sum skal vigast upp ímóti hvørjum øðrum í hesum málinum, sigur Bjarni Djurholm.

Hann vísir eisini staðiliga aftur, at landsstýrið berur ótta fyri, at sterka Maersk-Air konsernin kann skumpa lutfalsliga veikari Atlantsflog av marknaðinum.

- So spennandi er tann føroyski marknaðurin ikki, at teir fara at nýta nógvar milliónir upp á at eiga hann einsamallir, sigur Bjarni Djurholm.

### Á tveimum hesum

Eins og við øðrum almennum fyritøkum er Bjarni Djurholm í einari heilt serligari støðu, tá tað snýr seg um Atlantic Airways. Tað er landsstýrið, ið eigur Atlantic Airways. Landsstýrið verður umboðað av Bjarna Djurholm. Og hesin sami Bjarni finna vit aftur, tá leitað verður eftir føroyska myndugleikanum á økinum. Tað er Trafikministeriet í Danmark, sum ásetir ferðaseðlaprísirnar endaliga, men áðrenn hava teir verið ein túr forbí hjá Bjarna Djurholm til hoyringar.

Landsstýrið er sjálvsagt eisini fullgreiður yvir sína serstøðu. Í nýggja loftferðslupolitikkinum verður eisini hugt at, hvussu ásetingarmyndugleikin hjá landsstýrismanninum kann passa betri saman við starvið sum eigari av Atlantic Airways. Men tvístøða er so ella so framvegis galdandi til Atlantic Airways verður einskilt, og tað er í løtuni ógvuliga torført at siga um ella nær, hetta fer at henda.

Lesið meira um flogferðslu í Sosialinum í morgin.

# Verðinstónleikur í Norðurlandahúsinum

**Samiska høvuðsnavnið á Listastevnuni borðreiðir við tónleikaligum íblástri úr øllum heiminum**

LISTASTEVNA
*Heri á Rógvi*

Eitt sindur seinkað kom Mari Boine til Føroya um middagsleitið mánadagin. Mánakvøldið, t.e. efir at blaðið er farið til prentingar, hevur hon konsert í Norðurlandahúsinum.

Songkvinnan úr Sámalandi er høvuðsnavnið á Listastevnuni í ár, og tað er ikki uttan orsøk. Hon vann nevniliga tónleikavirðislønina hjá Norðurlandaráðnum í ár – eitt ár eftir, at Sunnleif Rasmussen fekk virðislønina.



*Mari Boine, sum vann tónleikavirðislønina hjá Norðurlandaráðnum, ætlar sær at liva upp til heitið sum høvuðsnavn á Listastevnuni.*

*Mynd: Heri á Rógvi*

- Mín tónleikur er eitt slag av verðinstónleiki: Ein blandingur av nógvum tónleikastílum, rokk, popp og øðrum, og so nýti eg millum latín amerikanskar tónleikarar, sigur Mari Boine í øllum hurlivasanum í Norðurlandahúsinum mánadagin.

Hon hevur verið virkin sum songkvinna í 22 ár, og hon hevur givið sjey egnar útgávur umframt at hava verið við í fleiri øðrum.

– So tú kanst gott kalla meg ein veteran, sigur Mari Boine.

Undan Føroya ferðini hevur spælt í Finnmørkini, og annars hevur Mari Boine verið á konsertferð fyrr í ár í millum annað Týsklandi og Spania, har hon eisini er væl móttikin.

Mari, sum syngur mest á sámiskum máli, er eitt sindur bilsin av, at hon er høvuðsnavn á Listastevnuni, men svarar sannførandi ja, tá spurt verður, um hon kann liva upp til hetta.

Hetta er fyrstu ferð, at Mari Boine vitjar í Føroyum, men steðgurin verður ikki drúgvur.